Krosstein

Skrivstovulærlingur søkist

Pf. Svend

Kundi tú hugsað tær eina framtíð innan skrivstovuyrkið?

Vit hava pláss fyri einum skrivstovulærlingi (m/k) í fyritøku okkara.

Vit kunnu bjóða tær:
- eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu í støðugari menning, har tú gerst partur av einum góðum »teami«, og har arbeiðsandin er av teim bestu
- tryggar arbeiðsumstøður
- góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.
Lærutíðin er ávikavist 2 ella 3 ár.
Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvshugað/-ur, ágrýtin og tilreiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri at tíðir at arbeiða undir trýsti.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Svend Krosstein ella Jan Danielsen.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við prógvum og ummælum til:

P/F Svend Krosstein
Falkavegur 6, Postboks 3229
FO-110 Tórshavn
Viðm. »Lærupláss«

Pf. Svend Krosstein er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 15 fólk í fulltíðarstarvi. Pf. Svend Krosstein er einasta VVS-heilsøla í Føroyum og hevur harafturat størsta VVS-handilin í landinum. Vit selja alt tilfar til vatnveitingar, hitaverk, sanitet og ventilatión. Eisini selja vit byrsur, patrónir, fiskireiðskap og annað.

Falkavegur 6 - FO 110 Tórshavn
Tel. 314600 - Fax 314601
Teldupostur: sk@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

- Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
- Seta gravsteinar upp v.m.
- Gera tún við flísum ella oljugrúsi
- Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

LANDSVERKFRØÐINGURIN

Verkfrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi til framleiðsludeildina hjá stovninum.
Framleiðsludeildin hevur skerv- og asfaltverkini og maskindeildina um hendi. Nýggi verkfrøðingurin fer at hava mest við skerv- og asfaltverkini at gera.
Asfaltframleiðslan fer fram í verkinum í Hundsarabotni, har framleitt verður til alt landið.
Roydarstova er knýtt til verkið. Bitumengoymsla er í Hósvík við blandiverki. Tilsamans eru 5 skervverk kring landið: Hundsarabotni, Lambareiði, Porkeri, Sandavági og Sandi.
Árliga verða 30-40 km av landsvegi asfalteraðir, eins og asfalterað verður fyri privat og kommunur.

Arbeiðsuppgávur
Høvuðsuppgávurnar eru planlegging í sambandi við framleiðslu og útlegging av asfalti og góðskustýring innan virksemið hjá deildini. Tann, ið settur verður, kann eisini rokna við at koma at arbeiða við øðrum á stovninum. Fasta tilhaldið verður á skrivstovuni í Havn.

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir verkfrøðingi við hollari ástøðiligari útbúgving og við góðum kunnleika til edv. Kunnleiki til ella royndir við asfaltframleiðslu er ikki nakað krav, men gevur tó fyrimunir. Rætta fólkið við áhuga fyri at seta seg inn í nevnda virkisøkið fær møguleikar at menna seg innan hetta økið við relevantari upplæring.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum fíggjarmálastýrið og verkfrøðingafelagið.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum verða at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi seinasta lagi 19. mars 2001. Merkið brævbjálvan »Umsókn eftir verkfrøðingi«. Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá deildarverkfrøðinginum á tlf. 311333, lok. 328. E-postur: oli@lv.fo ella lv@lv.fo

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893

ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

ADC

Dagrøktarmamma

Søkt verður eftir dagrøktarmammu sum avloysara, at byrja 1. apríl

Umsóknarfreist er 15. mars 2001.

Dagrøktin í Hvalvík
Tlf. 422717 & 422003

Nýtt • Nýtt • Nýtt • Nýtt • Nýtt • Nýtt • Nýtt

Frá CAFÉ NATÚR

Nú selja vit ALT út úr húsinum* t.d.
- Cafédrykkir og súpan í termokrússum
- Bakað epli o.a. heitir rættir
- Sandwich o.m.a.

*uttan alkohol

Broyttur matarseðil
Nógv nýtt leskiligt er komið á matarseðilin, t.d. av víni og cafédrykkum. Nógv nýggj sløg av sandwich.

NÝTT

Royn eisini okkara nýggju heimagjørdu lasagnu!

livandi tónleikur

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Arbeiðsfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir arbeiðsfólki til vegdeildina hjá teknisku deild.

Arbeiðsfólk til asfaltarbeiði
Søkt verður eftir arbeiðsfólki til vegdeildina hjá Tórshavnar kommunu at luttaka í asfaltarbeiði. Talan er um tíðaravmarkað starv frá miðan apríl til desember 2001.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Snarskivuna á tlf. 31 51 60.

Arbeiðsfólk til kantsteinsarbeiði
Søkt verður eftir arbeiðsfólki til vegdeildina hjá Tórshavnar kommunu til kantsteinsarbeiði at byrja skjótast til ber.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Snarskivuna á tlf. 31 51 60.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 22. februar 2001 samtykti broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er, at ein partur av A3-økinum (blandað bústaða- og miðstaðabygging), oman fyri vegin Langa millum, dagstovnin í Hoyvík og Løgmannabreyt, verður broytt til C1A-øki (øki til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, heilsubótarhøli, samkomuhús og tílíkt).

Tilfar sum lýsir broytingin liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mánadegi 5. mars 2001 til og við mánadagin 26.mars 2001, allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, tó hósdag til kl. 18.00.

Møguligt mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 5. juni 2001.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Frítíðaravloysari

Ellis- og Umlættingarheimið søkir eftir hjálparfólki at arbeiða 30 tímar um vikuna, at byrja 1 apríl 2001.

Arbeiðið
umfatar vanligt hjálparfólkaarbeiðið og alt vanligt arbeiði á heiminum, t.d. eldrarøkt og reingerð.

Arbeiðið er skipað í vaktum.

Løn
sambært galdandi sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Meir fæst at vita
um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, fyristøðukvinnu, tlf. 317339.

Umsóknir
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu verða Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 15. mars 2001.

SNARSKIVAN

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

Kunngerð

Sambært gr. 6 í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verður við hesum gjørt kunnugt, at Tórshavnar býráð á fundi 22. februar 2001 samtykt broytingar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Ætlaða broytingin er at broyta ástetta byggistigið fyri B3-vinnuøkið við Velbastaðvegin frá 0,4 til 0,5.

Tilfar sum lýsir broytingin, liggur frammi í Snarskivuni á Vaglinum, frá mánadegi 5. mars 2001 til og við mánadagin 26. mars 2001, allar gerandisdagar uttan leygardag frá kl. 9.00 til kl. 16.00, tó hósdag til kl. 18.00.

Møguligt mótmæli ella broytingaruppskot verða at senda Tórshavnar kommunu skrivliga í seinasta lagi 5. Juni 2001.

SNARSKIVAN

Dupulthús við Villingardalsvegin til leigu

Húsini eru í góðum standi, í tveimum hæddum og við sera góðum útsýni. Hvør hæddin er uml. 63 m².

1 hædd: Forstova, bryggers, tvey kømur og eitt stórt baðiverilsi.
2. hædd: Arbeiðsligur køkur/stova & stórt hjúnarúm.
Fittligur havi er um húsini.

Prísuppskot: 5.500- 6.000,- pr. mðr. + ljós og hita.
Leigusáttmáli fyri eitt ella tvey ár.

Skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 21.02.

TØKNISKI SKÚLIN

Evniskvøld fyri bilmekanikarar í CARB — OBD-II og EOBD

Mikukvøldið 7. mars kl. 19.00 verður evniskvøld úti á Bildeildini í Tekniska Skúlanum í Tórshavn har umrøðuevni EOBD, ið er tann nýggja lógarkravda tøknin, sum allir nýggir bilar við bensinmotorum skula hava, er høvuðsevni. Grundhugsanin um upprunan til ta tøkni og tey amboð, sum finnast til at leita fram møgulig brek á akførum ídag, og hvussu framyvir? Øll áhugaði eru vælkomin. Geri so væl og sigi okkum frá á tlf. 311957 innan kl. 12.00 mikudagin 7. mars.

Bildeildin úti í Smiðugerði,
Tekniski Skúlin í Tórshavn

Nú er nokk !

Nógmikið er slakað á fullveldisleið

Fólkafundur

verður á Vaglinum í Tórshavn
leygardagin 3. mars 2001 kl. 15

Røðarar verða:
Sjúrður Skaale
Álvur Kirke
Jóanes Nielsen
Carl Johan Jensen
Torbjørn Jacobsen

Janus Trúgvason spælir og syngur
Felagssangur

Við vón um stóra undirtøku

Unga Tjóðveldið

www.sosialurin.